# Junior Buss Taxa vann steypakappingina



*Liðið hjá Junior Buss Taxa vann steypakappingina um vikuskiftið. F.v. Rói á Rógvu, Bogi Simonsen, Arnbjørn Sivertsen og Hans Jacob Petersen*

STEYPAKAPPINGIN
*Bogi Simonsen*

Leygardagin 9. mars vóru hávlfinalurnar og sjálv finalan í steypakappingini í bridge leiktar í skúlanum í Runavík. Tey fýra liðini, ið høvdu spælt seg til hálvfinalurnar, vóru hesi:

Per Kallsberg
Per Kallsberg – Dánjal Pauli Mohr, Jóannes Mouritsen – Heðin Mouritsen

Eyðun Anthoniussen
Eyðun Anthoniussen – Símin Lassaberg, Magni Jøkladal – Robert Langaard

Junior Buss Taxa
Bogi Simonsen – Rói á Rógvu Joensen, Arnbjørn Sivertsen – Hans Jacob Petersen

Marner Joensen
Marner Joensen – Árni Dam, Høgni Vesturklett – Gunnar Mouritsen

Í tí einu hávlfinaluni møttust liðini hjá Per Kallsberg og Eyðun Antoniussen, hin hálvfinalan var millum liðini hjá Junior Buss Taxa og Marner Joensen. Liðið hjá Eyðun Antoniussen syrgdi fyri, at teirra dystur móti Per Kallsberg ikki gjørdist serliga spennandi, Eyðun Antoniussen vann ein sera tryggan sigur uppá 106 – 64. Hin hávlfinalan millum Junior Buss Taxa og Marner Joensen gjørdist sera spennandi og væl leikt, tá ið avtornaði vann liðið hjá Junior Buss Taxa tó við 64– 52.

Finalan var sostatt millum Eyðun Anthoniussen og Junior Buss Taxa. Í finaluni vóru 4 sektiónir uppá 10 spøl leikt. Her vóru sera nógv svingspøl, so úrslitini fyri hvørja sektión vóru eisini heilt misjøvn. Tá ið 20 spøl vóru leikt, var liðið hjá Junior Buss Taxa aftanfyri við 46 imp. Hetta er ein munur, sum ikki er lættur at vinna innaftur í bridge. Men við góðum spælið og fitt av hepni eydnaðist Junior Buss Taxa at vinna sektión 3 við heili 56-0. Nú var aftur spenningur í. Sektión 4, hevði ikki tað heilt stóra at bjóða uppá, og endaði hon nær um javnt, og sostatt vann liðið hjá Junior Buss Taxa finaluna og er steypavinnari í Bridge 2003. Vinnarin av finaluni skal umboða Føroyar í sera sterkari kapping, ið verður leikt í Rottneros í Svøríki í døgunum 9-11 mai 2003. Í kappingini luttaka allir teir norðurlensku steypavinnararnir.

**Tøl frá finaluni**

| Spæl | Eyðun | Junior |
|---|---|---|
| 1-10 | 36 | 27 |
| 11-20 | 46 | 7 |
| 21-30 | 0 | 56 |
| 31-40 | 11 | 18 |
| **Tils.** | **93** | **108** |

Eitt av spølinum, sum kostaði Junior Buss Taxa dýrt, var hetta:

Gevari: V/A

| Vestur: | Eystur: |
|---|---|
| Sp: D1072 | Sp: EK |
| Hj: 6 | Hj: E943 |
| Rú: EKDB1082 | Rú: 9 |
| Kl: 9 | Kl: ED765 |

Meldingarnar eru:

| Vestur | Eystur |
|---|---|
| Bogi | Rói |
| 1rú | 2kl |
| 2rú | 2hj |
| 3nt | |

Sjálvur haldi eg, at eg ikki meldaði mína hond serliga væl. 2rú er ok, men at leypa í 3nt eftir at makkarin meldaði nýggjan lit og soleiðis vísir styrki, er ikki eitt gott meld. Makkarin hevði ongan møguleika fyri at vita, at mín rútari er gangandi, og valdi tað sikra. Tað kostaði 13 imp, tá ið Símin og Eyðun meldaðu og vunnu 6 rút. Teir meldaðu kortini soleiðis:

| Vestur | Eystur |
|---|---|
| Símin | Eyðun |
| 1rú | 1hj |
| 1sp | 2kl |
| 3rú | 4ut |
| 5sp | 6rú |

**Landsliðini sett**

Føroyski landsliðsvenjarin, danin Svend Novrup, hevur nú úttikið landsliðið, ið skal umboða Føroyar í Norðurlandameistarakappingini, sum verður í Føroyum í mai 2003. Leikarnir eru:

Bogi Simonsen – Rói á Rógvu Joensen
Jóannes Mouritsen – Heðin Mouritsen
Dánjal Pauli Mohr – Per Kallsberg

**Kvinnulandsliðið sær soleiðis út:**
Marjun Restorff – Arnleyg Mikkelsen
Jóna Grunnveit – Henriette Svenstrup
Laila Danielsen – Maria Christiansen
Marner Joensen, liðskipari og venjari

## Jákup Mikkelsen spældi allan dystin

**Svenski landsliðsmálverjin má roknast sum fyrsta val í Molde, men Jákup ætlar at taka kappingina upp**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Seinnapartin týsdagin leikti Molde venjingardyst ímóti Hødd á graslíkisvøllinum í Molde. Jákup Mikkelsen leikti allan dystin, sum endaði 1-1.

Molde hevur higartil leikt sjey venjingardystir, síðan fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið í Noreg. Jákup hevur leikt teir tríggjar, meðan kappingarneytin, Eddie Gustafsson, hevur staðið hinar venjingardystirnar.

Í løtuni er svenski landsliðsmálverjin fyrsta val í Molde, men Jákup hevur borið fram, at hann ætlar sær at taka kappingina upp við svian.

Kappingarárið í Noregi byrjar 13. apríl. Molde leikar fyrsta dystin ímóti Odd Grenland á útivølli.

## Ingibjørg Poulsen vann silvurmerkið í kúlustoyt

**Tíðindaskriv**

Ingibjørg Poulsen, sum er í Aalborg í lestrarørindum, vann sær enn eitt heiðursmerki í Danmark tá hon sunnudagin gjørdist nummar tvey í Kúlustoyt á innandura »Vestdansk Mesterskab«. Tað er tað sum fyrr æt Jysk-Fynsk mesterskab. Ingibjørg stoytti kúluna út á 9.89 m.

Ingibjørg hevur fyrr vunnið eitt i bronsu merkið innandura og tvey bronsumerki uttandura til tað Jysk-Fynska meistaraheitið, og tvey silvurmerkið til Amstmesterskabet. HaraftUrat hevur hon tvey 5'ta pláss frá donskum meistaraheitum at vísa á, so ikki kann sigast annað enn at hon hevur bitið seg fasta í toppin í Danmark tá man tosar um at kasta. Tað verður spennandi at fylgja henni á komandi oyggjaleikum har hon luttekur í Kúlustoyt, Hamarkast og Diskoskast. Hon eigur tað føroyska metið í øllum hesum greinunum.



*Ingibjørg Poulsen stoytti kúluna heilar 9,89 metrar og vann silvurmerkið í Vestdansk Mesterskab*



Heimarøktin øki 4
Norðoyggjar

## Røktarstarvsfólk

Í samband við at starvsfólk fara/eru farin úr starvi og at nýggja Sambýlið undir Kráarbrekku letur upp, verður søkt eftir røktarstarvsfólki at arbeiða í skiftandi vaktum til Heimarøktina í Norðoyggjum, frá 1. apríl 2003 ella eftir avtalu.

Søkt verður eftir fólki við røktarfakligari útbúgving, so sum sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum, sjúkrahjálparum og heilsuhjálparum. Umsøkjarar verða settir í starv í Heimarøktini í Norðoyggjum, sum umfatar at arbeiða úti í býnum og inni á stovni.

Ynskiligt er, at evt. umsøkjarar í umsóknini skriva hvar ynskt verður at arbeiða, starvstíð og hvørja vakt (dagvakt, kvøldvakt ella náttarvakt).

Til Sambýlið undir Kráarbrekku verður søkt eftir einum fólki við kunnleika innan heilsugóðan kost.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran ella varaleiðaran á tlf. 222783 ella 222643.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin Í Norðoyggjum**
Bøgøta 34
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist:** 27. mars 2003

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
Hygg her!
mánadag - hósdag frá kl. 11.00 - 21.00
fríggjadag - leygardag frá kl. 11.00 - 15.00
AIRPORT STEAK
við kipsi og persillusmøri ella bearnaisesós og broysknum salati
bara 68,-



HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

## CAMBRIDGE EXAMINATIONS

First Certificate in English (FCE)
og Certificate of Proficiency in English (CPE)

Tilmeldingarfreistin til próvtøkurnar í mai/juni 2003,
er úti 17.3.2003 kl. 12.00

| Tilmeldingargjald: | First Certificate in English | 700,00 kr. |
|---|---|---|
| | Certificate of Proficiency | 900,00 kr. |

***Skal gjaldast kontant við tilmelding, sum fer fram á***

Setursskrivstovuni kl. 9.00 - 16.00 vanligar dagar og til kl. 12.00 mánadagin 17.3.2003.

**Setursskrivstovan**
J. C. Svabos gøta 14
tlf. 35 25 00

HANDILSLÆRLINGUR
TIL ÍTRÓTTARHANDIL

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrjað skjótast tilberð. Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðsla, prísmerking/ útpakking av vøru, móttøka og avgreiðsla av ordrum.
Tað er eisini møguleiki fyri at nemingurin kemur at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Tað er eitt krav at umsøkjarin hevur HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Í hesum tíðarskeiðnum skal nemingurin 3 ferðir 14 dagar á skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, møtir til tíðina, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rættið kunnu við bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin - 311820

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sportthd@post.olivant.fo

FAREL
EL-ARBEIÐI
Nýgerð
Umvælingar
Hvítvørur
FAREL
31 90 39 · 31 73 85




pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

## Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

## Volvo til sølu

Grá metal station V70, koyrt 57.000 km.

**Petur Nolsø**
Tlf. 311899

ELDRAFELAGIÐ NÓN

Aðalfundur verður mánakvøldið 17. mars 2003 kl 19.30

**Eldrafelagið Nón**

## Jørð í Sandavági til sølu

Um hóskandi boð fæst er matr. nr. 168 og 164 við ástandandi summarhúsi til sølu. Samlað vídd er 33.435 m².

**Tlf. 424155**